# Jóan Símun skal spæla millum teir vaksnu

**FÓTBÓLTUR Alan Pardew, venjari hjá Newcastle, vil, at ungu spælararnir í felagnum fáa seg royndar í vaksamannafótbólti. Tí skal Jóan Símun Edmundsson spæla í fimtbestu deildini í Onglandi næsta mánaðin**



*Føroyski landsliðsframherjin, Jóan Símun Edmundsson*

*Mynd: www.nufc.co.uk*

Uni Holm Johannesen

Fríggjadagin kom fram, at Jóan Símun Edmundsson hevur skrivað leigusáttmála við Gateshead, sum spælir í fimtbestu deildini í Onglandi.

Ian Bogie er venjari hjá Gateshead. Hann vísir á, at Alan Pardew, venjari hjá Newcastle, vil, at hansara ungu spælarar fáa seg royndar í vaksnamannafótbólti.

James Tavernier, verjuleikari í Newcastle, skal somuleiðis spæla við liðnum.

– Teir eru høgt í metum í Newcastle og hava eina bjarta framtíð, sigur Bogie við heimasíðuna hjá felagnum, og ger greitt, at Jóan Símun Edmundsson hevur royndir frá landsliðsfótbólti.

### Eykaliðið spælir ikki

Toftamaðurin í Newcastle hevur verið partur av eykaliðnum í hesum kappingarárinum. Næstbesta liðið hevur bara ein dyst á skránni í januar, og Gateshead skal spæla seks dystir.

– Umframt tað, so vil Alan Pardew, at teir ungu skulu royna okkum í vaksnamannafótbólti, og ikki bara í dystum fyri eykaliðið, har stigini ikki hava serliga stóran týdning, sigur Jóan Símun Edmundsson, sum heldur, at avbjóðingin er spennandi.

Gateshead er í økinum kring Newcastle.

### Javnt í fyrstu royndini

Føroyski landsliðsframherjin fekk sín elddóp fyri Gateshead leygardagin. Hann og liðfelagararnir spældu 2-2 móti Kidderminster á heimavølli.

Jóan Símun Edmundsson spældi allan dystin sum vongur í vinstru.

Heimaliðið kom á odda, men gestirnir svaraðu skjótt aftur og fingu leiðsluna. Gateshead fekk útjavnandi málið, tá eitt korter restaði í. Gateshead hevur ikki vunnið í seinastu átta royndunum. Liðið er nummar 17 í røðini av 24 liðum í Blue Square Premier.

Jóan Símun Edmundsson kom fram til nakrar góðar støður, men eydnan var ikki við honum, tá hann royndi seg móti málinum.

Næsti dysturin verður 18. januar, tá Barrow vitjar.

*uni@sosialurin.fo*

# Maradona nærkast Premier League

**FÓTBÓLTUR – Um tilboðið er nøktandi, so vísi eg tí ikki aftur, sigur Diego Maradona um gitingarnar, at hann skal vera venjari í Premier League. Hann vil hinvegin ikki siga, hvat felag talan er um**



*Diego Maradona verður kanska venjari í Premier League í næstum*

Uni Holm Johannesen

Miðlarnir í Argentina vita, sambært Reuters, at Diego Maradona fer til London í næstum at fundast við eitt felag.

La Nacion og Carlin, sum eru mest lisnu tíðindabløðini í Argentina, skriva, at Maradona fer til Onglands í næstum.

– Ja, eg skal práta við eitt felag. Um tilboðið er nøktandi, so vísi eg tí ikki aftur, sigur hann við Clarin. Hann vil ikki avdúka, hvat felag, talan er um, men bløðini siga seg vita, at tað er Fulham.

– Eg havi ongan tørv at fara aftur í venjarasessin, men eg veit, at eg fari at royna meg sum venjara aftur, sigur Maradona, sum takkaði fyri seg sum landsliðsvenjari í Argentina síðsta summar.

*uni@sosialurin.fo*

# Danmark er til reiðar

**HONDBÓLTUR Við einum tryggum 26-20 sigri á Tunesia, er Danmark til reiðar til heimsmeistaraskapi í hondbólti fyri menn, sum verður spælt í Svøríki og byrjar í næstu viku**

Uni Holm Johannesen

Tað leikaði leingi javnt á. Liðini fylgdust upp til 6-6, men so fór Danmark undan mótstøðuliðnum. Tá komið var til hálvleik, vóru danskararnir framman fyri 16-11.

Mikkel Hansen, sum er størsta stjørnan á danska liðnum, sat á beinkinum allan dystin, men kortini vann Danmark 26-20. Hann verður spardur fram til heimsmeistarakappingina, boðar Ulrik Wilbeck, venjari, frá í donskum miðlum í dag.

Donsku málverjarnir, Søren



Rasmussen og Nicklas Landin, stóðu seg eisini sera væl í venjingardystinum í gjár.